VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 13. |
| Fundardagur | 15. desember 2014 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

Møtt: Rósa Samuelsen, Jógvan S. Hansen, Egil Petersen, Marjus Dam, Dánjal Thomsen, Marin Bláberg, Jóhannis Joensen, Albert Ellefsen, Jonhard Joensen, Dánial Johansen og Johannes Ellefsen.
Skrivari: Georg Hansen.

# Yvirlit yvir mál til viðgerðar


| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 46 | Býarplanur broyting við Stóraklett í Sandavági | 2 |
| 47 | Samstarvsavtala millum Vága- og Sørvágs kommunu um Barnaverndartænastu. | 2 |
| 48 | Mannagongd viðv. journalini í Vága kommunu | 3 |
| 49 | Gonguteigar norðuri í Sørpum Sandavági, Jón Edvard Petersen | 4 |
| 50 | Bøgarður millum Fossá og Skoragil- Hagapartinum Gimbragongan í Sandavági | 5 |
| 51 | Umsókn um byggiloyvi til virkisbygning á Ytru Bryggju | 6 |
| 52 | Eykaætlan 3_EXTRA14_3 onnur viðgerð. | 7 |
| 53 | Ásetan av føstum fundardøgum í 2015 | 7 |

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 13. |
| Fundardagur | 15. desember 2014 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

**2014-41-57**

## 46. Býarplanur broyting við Stóraklett í Sandavági

### Málsfrágreiðing

Kommunustýrið er samt um at broyta vegaføringina til útstykkingina við Stóraklett. Henda vegaføringg er ikki í býarplaninum. Neyðugt er tí at broyta býarplanin.

**Tekniska nevnd, 5. desember 2014, pkt. 9:**

Mælt verður til at broyta býarplanin.

### Avgerð

Samtykt.

**2014-31-45**

## 47. Samstarvsavtala millum Vága- og Sørvágs kommunu um Barnaverndartænastu.

### Málsfrágreiðing

Kvívíkar og Vestmanna kommunur hava sagt upp samstarvsavtaluna um barnaverndarsamstarv til tann 31/12-2014.

Uppskot er gjørt um nýggja samstarvsavtalu um barnaverndarsamstarv millum Sørvágs- og Vága kommunur.

**Umsitingin mælir til, 10. november 2014, pkt. 7:**

At arbeiða víðari við uppskotinum um avtalu.

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 13. |
| Fundardagur | 15. desember 2014 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

**Mentunar- og trivnaðarnevnd, 10. november 2014, pkt. 7:**

Mælt verður til at arbeiða víðari við uppskotinum um avtalu.

**Umsitingin mæli til, 4. desember 2014, pkt. 6:**

at viðmæla smærri broytingar í avtaluni, sum eru gjørdar í samstarvi millum AMR og borgarstjórarnar í Vága og Sørvágs kommunu.

**Mentunar- og trivnaðarnevnd, 4. desember 2014, pkt. 6:**

Viðmælt.

**Fíggjarnevnd, 9. desember 2014, pkt. 53:**

Viðmælt

### Avgerð

Samtykt.

**2014-04-16**

## 48. Mannagongd viðv. journalini í Vága kommunu

### Málsfrágreiðing

Mannagongd fevnir um:

Skjalasøvn

Eftirlit við almennum skjalasøvnum.

Fyrisitingarlóg

Notat

Alment innlit

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 13. |
| Fundardagur | 15. desember 2014 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

Kirkjugarðsbøkur

Fólkayvirlit

Matrikulyvirlit

Starvsfólkamál

Barnaskrá

Ognarbrøv

**Fíggjarnevnd, 9. desember 2014, pkt. 54:**

Mælt verður til at samtykkja fyriliggjandi uppskot fyri mannagongd viðvíkjandi journalini.

### Avgerð

Samtykt.

**2014-44-31**

## 49. Gonguteigar norðuri í Sørpum Sandavági, Jón Edvard Petersen

### Málsfrágreiðing

Jón Edvard Petersen, sum býr í Sørpum, er harmur um, at kommunan ikki hevur gjørt gongubreytirnar lidnar í býlinginum. Hann hevur sjálvur lagt betongflísar á tún sítt, men av tí, at kommunan ikki hevur gjørt gongubreytina, leggjast smásteinar á flísar hansara og oyðileggja tær. Hann sigur, at kommunan eigur betongflísar og bjóðar sær til, ókeypis at leggja tær á treytað av, at kommunan flytir tær á staðið og veitir tilfar til undirlendið.

**Tekniska nevnd, 5. desember 2014, pkt. 7:**

Mælt verður til at svara, at kommunan hevur í umbúna at asfaltera gongubreytina komandi ár.

**Fíggjarnevnd, 9. desember 2014, pkt. 56:**

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 13. |
| Fundardagur | 15. desember 2014 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

Taka undir við Teknisku Nevnd.

### Avgerð

Samtykt at svara, at kommunan hevur í umbúna at asfaltera gongubreytina komandi ár.

**2014-47-6**

## 50. Bøgarður millum Fossá og Skoragil- Hagapartinum Gimbragongan í Sandavági

### Málsfrágreiðing

Hagaparturin Gimbragongan heitir á kommununa um at halda portur við síðuna av rætt teirra, sum er partur av bøgørðunum í Sandavági.

Støðan er tann, at menn eru ymiskir á máli um, hvørt kommunan eigur at halda hetta portur, ella tað er hagin.

Umsitingin tann **5. desember 2014, pkt. 2:**

Mælt verður til, at T.N. fer á staðið og ger eina niðurstøðu um kommunan skal halda portri ella ikki.

**Tekniska nevnd, 5. desember 2014, pkt. 2:**

Mælt verður til, at kommunan tekur øll portur í bøgørðunumvið í viðlíkahaldið.

**Fíggjarnevnd, 9. desember 2014, pkt. 59:**

Taka undir við Teknisku Nevnd

### Avgerð

Samtykt at kommunan tekur øll portur í bøgørðunumvið í viðlíkahaldið.

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 13. |
| Fundardagur | 15. desember 2014 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

**2014-51-3**

## 51. Umsókn um byggiloyvi til virkisbygning á Ytru Bryggju

### Málsfrágreiðing

Uni Joensen søkir um at víðka um leigaða økið á Ytru Bryggju í Miðvági og um byggiloyvi til eina sproytuhøll, sum skal byggjast uppí verandi bygning. Harafturat skal ein vaskiplattur gerast og restin av økinum skal brúkast til parkeringsøki. Ynskta øki verður tilsamans 36,02x16,6m.

Nærri greining av málinum verður løgd fram á fundinum.

**Áður samtykt í hesum máli:**

Tekniska nevnd samtykti á fundi 15. august 2014 at málið skuldi kannast nærri.

Á fundi í Teknisku Nevnd 12. september, verður mælt til:

At leigumálið verður víðkað.

Samtykt við treyt um at umhvørvis- og brunatrygd , sum verður at áseta saman við umsitingini, verður yvirhildið og at parkeringsøkið verður innhegnað.

**Tilmæli. 17. september 2014, pkt. 6:**

Meta ikki at málið er búgvið til støðutakan.

**Fíggjarnevnd, 17. september 2014, pkt. 6:**

Málið verður beint aftur í Teknisku nevnd.

Nýtt í málinum er, at umsøkjarin ynskir at fáa málið um at sleppa at leiga økið, biðið er um, avgreitt og byggiloyvi til uppíbygning til verandi bygning.

Sproytikabinan, sum umsøkjarin hevði í umbúna at keypa, er gloppum honum av hondum. Møguliga kemur onnur umsókn um loyvi at sproyta bilar seinni. Um so er, er tað eitt annað mál.

**Tekniska nevnd, 5. desember 2014, pkt. 3:**

Mælt verður til at geva byggiloyvi sambært umsókn.

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 13. |
| Fundardagur | 15. desember 2014 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

### Avgerð

Samtykt at geva byggiloyvi sambært umsókn.

**2014-11-9**

## 52. Eykaætlan 3_EXTRA14_3 onnur viðgerð.

### Málsfrágreiðing

Eykaætlan 3.

Raksturin hækkar við 35 tkr.

Løgur minka við 1,1 mkr.

Meirinntøkur 5.2 mkr.

RLÚ 6.3 mkr.

**Tilmæli 9. desember 2014, pkt. 62:**
Mælt verður til at samtykkja eykaætlan 3.

**Fíggjarnevnd, 9. desember 2014, pkt. 62:**

Viðmælt

### Avgerð

Samtykt.

**2014-02-7**

## 53. Ásetan av føstum fundardøgum í 2015

### Málsfrágreiðing

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 13. |
| Fundardagur | 15. desember 2014 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

Sambært fundarskipan fyri Vága kommunu, kapittul 1, stk. 2, skulu fundardagar verða ásettir fyrst í árinum og lýstir. Umsitingin metir, at rætt er at áseta fundardagarnar, áðrenn árið byrjar.

**Avgerð**

Samtykt at almennu kommunustýrisfundirnir vera hesar dagar:
26. januar
23. februar
23. mars
20. apríl
18. mai
15. juni
31. august
28. september
26. oktober
23. november

**Bók lisin Fundur lokin**

Rósa Samuelsen
Dánial Johansen
Jóhannes Ellefsen
Jógvan Sjúrður Hansen
Jonhard Joensen
Jóhannis Joensen
Marjus Dam
Egil Petersen
Marin S. Bláberg
Dánjal Thomsen
Albert Ellefsen